Hvussu ætlar tú at húsast í framtíðini?

Vel væl!



... X við Fjarðahús

- frá dreymi til veruleika

Yvirlit yvir vælmøguleikarnar fáast við at venda sær til Vestmanna Timburhandil.

Vestmanna Timburhandil · tel 472 000 · fax 472 001 · vt@vt.fo · www.vt.fo




# Javnstøða – fólkaræði

VIÐMERKING

*Kirsten Brix*

Í valsending hjá Miðflokkinum í útvarpinum varð spurt, um flokkurin ætlar sær at avtaka Javnstøðunevndina, fær hann møguleika fyri tí. Høvuðsvalevni floksins drálaði eitt sindur, men svaraði so, at tað væl kundi hugsast, tí í Føroyum vóru kvinnurnar ikki undirkúgaðar.

Í einum landi við fólkaræðisligari stýrisskipan sum eitt nú í Føroyum kunnu vit tala um javnrætt. Kvinnur og menn kunnu søkja somu útbúgvingar, somu størv, hava valrætt og eru valbar, gera sama arbeiði. Ongar lógir forða fyri tí. Her er talan um karmar, sum skulu tryggja tí einstaka, kvinnu sum manni, rættindi til sjálv(ur) at velja eftir áhuga, evnum og førleika.



*Kirsten Brix*

Men eitt eru lógir og ætlanir, eitt annað veruleiki. Javnrætturin hevur ikki havt við sær javnstøðu. Á øllum økjum eru tað menninir, sum taka avgerðir. Teir sita í meiriluta í øllum týðandi nevndum, har viðurskiftini hjá okkum øllum verða avgjørd. Teir avgera við sínum raðfestingum og játtanum, hvussu karmarnar verða fyltir út - frá landspolitikki til gerandisdagin hjá tí einstaka borgaranum. Hetta er ikki javnstøða, og hetta er ikki ektað fólkaræði.

Hóast langur vegur er eftir til eitt javnstøðusamfelag, so eru nógv framstig gjørd, bæði úti í samfelagnum og á heimaøkinum. Men tað er umráðandi at minnast til, at javnrættur ikki er nøkur náttúrulóg. Vunnin rættindi kunnu missast aftur og verða tað, um vit ikki eru á varðhaldi.

Herfyri var ein dokumentarsending um kvinnurnar í Afghanistan, sum BBC hevði gjørt, send í SvF. Har varð upplýst, at viðurskiftini í landinum einaferð hava verið øðrvísi. Frá 1964 og upp gjøgnum 70-árini hevði landið eina demokratiska stýrisskipan. Tá høvdu kvinnurnar valrætt, tær sluppu at útbúgva seg, at arbeiða og at taka lut í samfelagslívinum annars. At fanatiskir fundamentalistar tóku hesi grundleggjandi mannarættindi frá teimum, órógvaði ikki vesturheimin, sum við USA á odda sigur seg verja fólkaræði og mannarættindi um allan heim. Tað, sum Taleban og aðrir ikki minni kvinnuvanvirðandi, fundamentalistiskir felagsskapir gjøgnumførdu, var einki annað enn brotsgerðir móti mannaættini. Men tað var ikki hetta, sum fekk tær vesturlendsku stjórnirnar at leypa á við øllum hugsandi vápnum og servandum herliðum. Tær rættu ikki hond frá síðu, tá ið kvinnurnar vórðu gjørdar til ikki-borgarar.

Í Norðurlondum hava vit eina sterka, fólkaræðisliga skipan. Men hon er kortini ikki sterkari, enn vit sjálv gera hana. Hon er okkara ábyrgd og okkara avbjóðing hvønn einasta dag. Kvinnur og menn eru ymisk, hugsa og raðfesta ymisk, og tá ið bæði kynini á jøvnum føti eru við til at taka avgerðir um øll viðurskifti, kunnu vit tala um veruligt fólkaræði. Ikki fyrr. Javnstøðulógin er eitt amboð til at styðja hesa menning. Mótstøðan móti henni hevur ymisk snið. Men undir teimum meira og minni fantasifullu undanførslunum býr ein ódemokratiskur hugsanarháttur, ein roynd at tvíhalda um eina valdsstøðu, sum í síni kjarnu í roynd og veru er ein hóttan móti fólkaræðinum.

# Vit gloyma ikki tykkara lyfti

**– Betri varð, um politikararnir lovaðu minni, men gjørdu meir. Politikararnir skulu í øllum førum stóla uppá, at vit fara at minnast og minna teir á, hvat teir hava lovað undan valinum, og halda teir ikki lyftini, verður tað ein ordiligur smeitur fyri teir, sigur Símun Pauli Poulsen, formaður í Eldraráðnum og skrivari í Landsfelag Pensjónistanna**



*Landsfelag Pensjónistanna heitir á allar pensjónistar um ikki at velja av gomlum vana, men heldur velja tey, sum stuðla pensjónistunum.*

*Savnsmynd*

VALAGN

*Turið Kjølbro*

Allir flokkar fríggja til tey eldru í valstríðnum. Lovað verður hægri pensjónir, at nøkta tørvin á ellis- og røktarheimum, at døgnrøkt verður sett á stovn og annað. So er undan hvørjum vali, men hesu ferð hevur Landsfelag Pensjónistanna fingið lovað skrivliga og munnliga frá fýra flokkum, at lyftini verða hildin, um hesir koma í Tinganes eftir valið.

– Tað hava vit aldri fingið lovað fyrr, so nú hava vit orsøk at trúgva, at vallyftini verða hildin. Politikararnir skulu í øllum førum stóla uppá, at vit fara at minnast og minna teir á, hvat teir hava lovað. Sum ein norskur politikari segði við okkum á fundi í Nordisk Samarbeidskomité, at nógv verður lovað, men tá ið politikararnir koma til valdið, er alt gloymt. Vit hava sent nógv mál til myndugleikarnar uttan at lurtað verður eftir okkum. Vit ynskja at verða tikin upp á ráð, tað verða vit als ikki og tað er ógvuliga spell. Einasti politikarin í hesum valskeiðnum, sum hevur gjørt sum lovað, er Helena Dam á Neystabø, sum hækkaði fólkapensjónirnar, sigur Símun Pauli Poulsen, formaður í Eldraráðnum og skrivari í Landsfelag Pensjónistanna.

Fyri góðum mánaði síðani sendi Landsfelag Pensjónistanna øllum formonnunum í politisku flokkunum bræv, har spurt varð, hvørja ætlan teir hava viðvíkjandi fólkapensjónini og at nøkta tørvin á ellis- og røktarheimum.

– Vit høvdu als ikki roknað við, at teir fóru at svara. Men trúgv mær, at fýra av seks formonnum annaðhvørt ringdu ella skrivaðu aftur til okkara og greiddu gjølla frá, hvørjar ætlanir teir hava viðvíkjandi teim eldru og hvussu hesi lyfti verða veruleiki, um teir koma til valdið eftir valið. Vit hava einki hoyrt frá Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum og tað undrar okkum, sigur Símun Pauli Poulsen.

Sjálvur tekur Símun Pauli Poulsen givnu lyftini frá floksformonnunum í álvara.

– Tá ið teir hava verið so beinasamir at vent sær til okkara beinleiðis, mugu vit trúgva tí, teir siga. Verður ikki soleiðis sum teir lova, verður tað ein ordiligur smeitur fyri teir, sjálvt um vit sjálvsagt vita, at lyftini verða givin fyri at fáa atkvøður. Hinvegin hevði verið betri, um lovað varð minni undan hvørjum vali, men meiri fingið av skafti, sigur Símun Pauli Poulsen, sum er ógvuliga spentur at vita, hvør fer at umsita eldraøkið í landsstýrinum.

– Vit vóna at fáa ein landsstýrismann, sum brennur fyri teim eldru.

Sambært Símun Paula Poulsen meta pensjónistar, at ein hægri fólkapensjón og fleiri ellis- og røktarheim eiga at verða sett ovast á dagsskránna.

– Pensjónin er hækkað nakað, men eigur at verða hækkað væl meiri. Onkur bati er komin seinnu árini, men alt ov fáir. Bæði Eldraráðið og Landsfelag Pensjónistanna hava skotið upp fyri myndugleikunum at byggja eldraíbúðir sum í Íslandi, sum eru væl bíligari enn her, sigur Símun Pauli Poulsen.

Eldraráðið varð stovnað eina ferð í sjeytiárunum, men fýra landsstýrismenn umsótu økið uttan at reglugerð varð gjørd fyri ráðið.

Í seinasta blaðnum hjá Landsfelag Pensjónistanna, Sólsetur, heitir felagið á allar pensjónistar um ikki at velja av gomlum vana, men heldur velja tey, sum stuðla pensjónistunum. Har verður sagt, »Allir flokkar eru farnir at fríggja til pensjónistarnar og lova bæði gull og grønar skógir, ein ávaring! Mussi ongan fyrrenn tit síggja, at teir gera okkurt áðrenn valið, um teir, sum stilla upp til løgtingsvalið, eru líka dementir ella verri enn vit, tí eftir valið er alt gloymt, sum teir hava lovað okkum.«


HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar

www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

**Citroen Jumpy 1,9TD**
**8 fer andi**
km. 28.200, árg. mars 2000
**190.000,-**

**Citroen Xantia**
**1,9 TD 5H**
km. 94.000, árg. okt. 1996
**115.000,-**

**Citroen Xantia II**
**2,0 HDi stc. 5H**
km. 100.000, árg. sept.1999
**139.000,-**

**Citroen Xsara**
**2,0 HDi Stc.**
km. 17.000, árg. juni 2000
**150.000,-**

**Citroen Xsara**
**1,9TD**
km. 83.000, árg. des. 1998
**120.000,-**

**Mitsubishi L300**
**2,5D**
km. 161.000, árg. juni 1994
**70.000,-**

**Mitsubishi Lancer**
**1,5 GLXi 5h**
km. 118.000, árg. juni 1992
sýnaður 12'01 **50.000,-**

**Hyundai Accent 1,3**
**LS 5H**
km. 65.000, árg. feb. 1999
**75.000,-**

**Peugeot 306**
**D 4H**
km. 150.000, árg. apr. 1995
**80.000,-**

**Seat Cordoba 1,9SDi**
**STC. 5h**
km. 35.500, árg. aug. 1999
**115.000,-**

**Ford Escort STC.**
**VAN**
km. 95.500, árg. mars 1997
**53.000,-**

**Ford Courier vøruv.**
**1,8D**
km. 78.000, árg. feb. 1996
**47.000,-**

**VW Polo**
**1,9TD**
km. 120.000, árg. mai 1996
**75.000,-**

**Nissan**
**Sunny**
km. 197.000, árg. 1987
sýnaður 01'02 **11.000,-**

**Mazda 323**
**1,3 4h**
km. 211.000, árg. 1989
**32.000,-**

Sosialurin - 311820

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

*Vælkomin til*

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar

*www.ivan.fo*